# Magni spyr um kringvarpið

Magni Laksáfoss hevur sett Helenu Dam á Neystabø fýra spurningar um Kringvarpið:

1. Hvussu hevur gongdin verið seinastu 5 árini innan lýsingarinntøkur í útvarpinum?

2. Hvussu hevur gongdin verið seinastu 5 árini innan aðrar fíggjarligar inntøkur hjá Kringvarpinum?

3. Hvørjar eru vánirnar fyri árið 2011 innan lýsingarinntøkur og aðrar fíggjarligar inntøkur?

4. Hvørjar ætlnir hevur landsstýrismaðurin at fylgja samtyktini í mentanarnevndini um at lýsingarinntøkurnar hjá Kringvarpinum skulu niðurlagast, samstundis sum »fíggjarligi parturin eigur at uppvigast«?

Magni Laksafoss vísir í viðmerkingum á tað, sum Mentanarnevnd løgtingsins hevur í viðmerkingum til løgtingslóg sagt: »Nevndin er av teirri áskoðan, at fyri at kringvarpið kann varðveita tað óheftni, sum ein publicservice stovnur eigur at hava, eigur at verða miðað ímóti, at tann bindingin, sum liggur í lýsingarinntøkum frá handilslýsingum í kringvarpinum verður niðurlagað í eitt 5 ára tíðarskeið. Samstundis ásannar nevndin, at tann fíggjarligi parturin eigur at uppvigast.«

– Nú fimm ár eru liðin síðan omanfyrinevnda varð samtykt, tykist rætt at eftirmeta gongdina. Løgtingið hevur í seinastuni samtykt broytingar í kringvarpsgjaldinum fyri at uppviga fíggjarliga partin. Áhugavert kundi verið at frætt, um lýsingarinntøkurnar frá handilslýsingunum samstundis eru niðurlagaðar, sigur Magni Laksáfoss.

# Amariel Norðoy í Gallerie Focus



Amariel Norðoy í Galerie Focus. Fríggjadagin 25. februar kl. 16 til 18 letur ein framsýning við verkum hjá Amariel Norðoy upp í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20 í Havn.

Amariel Norðoy er málari og grafikari. Hann hevur sýnt fram ymsa staðni í Europa, USA og Japan, hann er útbúgvin skipasmiður. Det Kongelige Danske Kunstakademi, København, 1977-83. Grafiskt skeið, Finland, 1984. Hann hevur m. a. prýtt skúlan í Porkeri, Lágargarð, Tórshavn. Samuels Kirkjuna í Keypmannahavn. Prýtt ymisk tíðarrit, bøkur og plátu- og fløguhúsar. Afturvendandi temu hjá Amarial Norðoy eru Skiftandi ljósið, Báturin og Útróðrarbørn, flestu myndirnar eru íblástur frá uppvøkstrinum, Mikladalur og Kalsoyarfjørður.

Framsýningin verður opin til 10. mars, týsdag til fríggjadag kl. 15 til 18 og leygardag kl. 16 til 18.

# 130 myrdu Oluf Palme

**PALME-MORÐIÐ Enn hevur svenska løgreglan ikki uppklárað morðið á forsætisráðharran, Oluf Palme, fyri 25árum síðani**

Árni Joensen

Tað stendur ikki á hjá løgregluni at finna fólk, sum eru til reiðar at játta seg sek. Blaðið Dagens Nyheter skrivar, at síðani løgreglan fór undir at kanna morðið, hava ikki færri enn 130 fólk viðgingið, at tey myrdu Palme.

Svenska løgreglan ásannar, at ofta er lítið høpi í teimum upplýsingum, sum fólk koma við, men enn vónar hon, at onkur fer at koma við tí, sum kann loysa gátuna. Stig Edqvist hjá løgregluni, sum hevur arbeitt við Palmemorðinum í 14 ár, ásannar í samrøðu við Dagens Nyheter, at tað er ikki altíð líka hugligt at arbeiða við einum tílíkum máli.

Løgreglan hevur skrivað frágreiðingar um øll tey 130, sum hava sagt, at tey myrdu Palme. Men løgreglan trýr ongum teirra. Tann einasti, sum kundi sannføra løgregluna um, at hann var drápsmaðurin, var Christer Pettersson. Hann bleiv eisini dømdur, men varð seinni fríkendur. Í 2004 segði Christer Pettersson, at hann hevði okkurt, sum hann ætlaði sær at siga eftirkomarunum hjá Palme, men hann doyði av heilsbløðing, áðrenn hann fekk sagt tað.



*Oluf Palme*

# Íslendingar fara at siga ja

**ICESAVE Tað er líkt til, at ein meiriluti av íslendingunum fara at siga ja, tá fólkaatkvøða verður um Icesave-lógina**

Árni Joensen

Ein meiningakanning, sum varð kunngjørd fyrradagin, vísti, at knappliga 58 prosent ætla sær at atkvøða fyri lógini.

Tað vakti ans, tá Ólafur Ragnar Grímsson, forseti, sýtti fyri at staðfesta Icesave-lógina, sum Altingið samtykti í síðstu viku. Men meiningakanningin fyrradagin vísti, at forsetin stendur ikki einsamallur. Næstan 61 prosent av teimum, sum ætla sær at atkvøða fyri lógini, siga, at tað var rætt av forsetanum at nokta at staðfesta lógina uttan fólkaatkvøðu.

Í kanningini sæst, at fólk, sum styðja stjórnina hjá Jóhonnu Sigurðardóttir, hava ikki somu uppfatan av avgerð forsetans sum tey, ið styðja andstøðuna. Men munurin er ikki stórur. Av veljarunum hjá stjórnarflokkunum siga 74,3 prosent, at tey eru ósamd við forsetan, men 76,5 prosent av veljarunum hjá andstøðuni taka undir við honum.

